VIÐMERKINGAR

# Velja vit kikaran hjá Nelson ella tignina

**Bergur Wardum**



Viðmerking til málsviðgerðina av fyrverandi landsstýrismanni Jørgen Niclasen vm. Í sambandi við misálit á landsstýrismannin, Jørgen Niclasen, opnaði Fólkaflokkurin allar hurðar bæði fyri núsitandi samgongu og at skipa samgongu við anstøðuna, fyri at reinsa Jørgen fyri ákærurnar hjá kanningarstjóranum, Turið Debes Hentze, um, at Jørgen hevði gjørt seg sekan í, uttan heimild, at seta almennan pening í váða vm, sum er greitt dømi um, at stýrisskipanarlógin hevur spælt fallit! Skúladømi í donskum revsirætti er um persón, sum bleiv dømdur fyri "mandatsvik og underslæb" fyri í heimildarloysi at seta pening hjá øðrum persóni í váða.

Tað er ikki Jørgen ella Fólkaflokstatikkurin, ið eigur at vera hugt at, men at sjálvari stýrisskipanarlógini, sum so dyggiliga spældi fallit, og einans tí, at løgfrøðingarnir, tvs sakførararnir, Bjørn av Heygum, Annfinn Vitalis Hansen og aðrir, sum løgdu navn til stýrisskipanarlógina, ikki unti løgmanni og landsstýrismonunum sama tryggleika, sum teir sjálvur hava, tá teir verða mettir ov lættir. Munurin er, at verður ein advokatur funnin ov lættur av Advokatráðnum so hevur hann møguleika at skjóta avgerðina inn fyri Landsrættin, meðan hvørki løgmaður ella nakar landsstýrismaður hevur henda sama møguleika.

Sjálvandi átti Jørgen, eins og Signar á Brúnni, at fingið henda møguleika at reinsa seg á ein virðiligan hátt, soleiðis at vit kundu sloppið undan tí sirkusi, sum fór fram, tá misálit bleiv reist á Jørgen!

Annars átti persónur, sum misálit verður reist ímóti, tað verið seg frá kaningarstjóra elle fúta at verið fyribils loystur úr týðandi starvi, og fingið starvið aftur, tá viðkomandi var reinsaður. Hvar hoyrir tað heima, at maður, sum stendur undir ákæru fyri neyðtøku, ella fyri í heimildarloysi at hava sett almennan pening í váða, umboðar føroysku tjóðina úteftir, eins og inneftir!

Tað kann soleiðis sigast, at tað eru teir løgfrøðingarnir, sum løgdu navn til stýrisskipanarlógina, sum eiga æruna av tí møguliga justismorði, sum bleiv framt ímóti Jørgeni, um tað bleiv framt eitt justismorð !

Tað, vit hava sæð, er einki annað enn, at ávísir persónar hava víst løgmans- og landsstýrismannastarvinum størstu vanvirðing !

Nú ein fjórðingur at av landsstýrinum eru løgreglumenn eru Føroyar nærum vorðnar ein politistatur, (sjálvt um hesir ikki fingu neyðugu atkvøðurnar, sum skulu til fyri at koma á ting), og løgmaður hevur kravt av tí eina lansstýrismanninum / politistinum, at rudda upp í Fiskimálaráðnum, so skal vera heitt á hann um beinanvegin at fara í holt við at gjøgnumganga tvingsilssøluuppgerðirnar av teimum fiskiførum, sum landskassin hevur mist pening av.

Henda áheitan tekur støði í, at eg, vegna sakføraran hjá Fiskimálaráðnum og landskassanum, Poul Hansen, bar spurning víðari til PØ-nevndina hjá Fólkatinginum, soleiðis, at PØ-nevndin kundi stilla løgmálaráðharranum spurning um heimild hjá Føroya Banka, at mótrokna sínar annars mistu veðrættir í sjógvpantinum, soleiðis, at landskassans veðrættur kom í vanda !

Hetta varð gjørt í samband við at fáa skapt fortreytir soleiðis, at faðir hanara, reiðarin, Aksel Hansen, kundi fáa sanerað trolaraflotan, annars fór hann og flotin hjá honum av knóranum, og vóru teir nógvir, sum fóru av knóranum av nevndu orsøk ! At advokaturin ikki maktaði at gera vart við seg á røttum stað, ið var, sum sakførari hjá landinum og í Fútarættinum, komst av, at tá vildi bankin skrúva fyri tí heita vatninum, og Aksel, saman við hansara flota, vildi farið av knóranum!

Hetta slag av bankvirksemi er ikki eindømi, og havi eg sæð tað í øðrum sambandi, og sostatt kundi alt bent á, at mannagongdin er fallin aftur á ta gomlu siðvenjuna, har bankans veðrættir koma fram um landskassans, sjálvt um teir standa seinni í røðini ! Tað er nokk til at rudda upp í hjá einum lansstýrismanni í Fiskivinnumálum, hvørt einasti førleiki er, at hann er útbúgvin politistur, ella er hondplukkaður av Fólkaflokkinum til at seta kikaran fyri tað blinda eyga, som gamli Nelson gjørdi, og er tað nokk av tí slagnum av tinnsoldátum í skaranum hjá okkara fúta at taka av!

**PS**

Í samband við starvssetanina av landsantikvari, man fáur so munnfimur persónur, sum landsstýrismaðurin, Annlis Bjarkhamar, hava niðurgjørt tann fyrst innstillaða umsøkjaran, sum hon hevur gjørt í síni sjálvrættvísgerðing av setanini av persóni, sum beinleiðis gav skeivar upplýsingar um seg, fyri at náa starvinum, og sjálvt tá tað kom fram, hevði hetta ongan týdning fyri hana, og avdúkar hetta, at hon ikki er egnað til sítt starv sum landsstýrismaður, tá ein landsstýrismaður má duga at orða seg við skili og tign.

Tá kvalifiseraður umsøkjari í styttri tíðarbil hevur røkt starvið til lítar, verður vrakaður á henda hátt, og eftir, at hann var fyrst innstillaður, eigur tað at verða settur spurningur við vístan setannarpolitikk hjá hesum fullveldislandsstýri, og um hann einans tekur støði í, um hægsti førleiki fyri almennari starvssetan er, at viðkomandi skal kunna drena / nassa mest møguligt úr grunnum í øðrum londum.

# Tað má loysa seg betur at framleiða

**Brandur Sandoy**
*bóndi, Sandur*

Nú um dagarnar hevur nógv verið at hoyrt og lisið um mjólkaprísir og landbúnað yvirhøvur. Eitt nú var ein av landsins kosnu í SvF, tí at hann helt seg hava fingið eitt so sera gott hugskot, um at innflyta mjólk úr Skotlandi. Har lá prísurin á umleið 5 kr/litur. Tá mjólkin var komin til Føroya, lá prísurin á umleið 6,50-7 kr/litur. Hetta var so prísurin, sum vit komu at gjalda fyri skotska mjólk. Tað sum hesin, so annars skilagóði maður, í allari síni fáfongd gloymdi (við vilja), var at rokna flutningin innanoyggja og vinning handilsmansins uppí liturprísin, sum sostatt kemur at liggja áleið sama støði, sum tann føroyska mjólkin, kanska heldur lægri.

Hann var tó ikki á heilt skeivari kós, tá hann tók trupulleikarnar í landbúnaðinum upp. Henda vinna hevur sanniliga stórar trupulleikar at dragast við. Fleiri fjós eru niðurbundin av skuld, og slátturlendi er samanborið við onnur lond sera lítið. Hetta, saman við stórum studningi í útlandinum gerð, at vit í Føroyum ikki klára at framleiða mjólk líka bíliga, sum onnur lond. Harafturat royna vit at halda lív í mjólkaframleiðsluni í útjaðaranum, og tað kostar jú eisini.

Vit klára at framleiða mjólk bíligari við at leggja fjós saman, tí tá verður framleiðslan nógv rationellari, men so mugu vit gera okkum greitt, at útjaðarin verður at bera kostnaðin.

**Sanering**

Ætlanin hjá Bjarna Djurholm er at sanera tey fjós, sum ikki megna at gjalda skuldina, sum hevur hópað seg upp. Hetta skal tó ikki ganga út yvir festiviðurskiftini. Hetta tykist mær at vera ein hálvhjartað loysn, sum als ikki fer at bera við teir grundleggjandi trupulleikarnar. Tá hesi fjós, sum flest øll eru yvir 20 ára gomul, eru saneraði niður í tað skuld, tey klára at bera beint nú, standa tey yvir fyri stórum íløgum, sum tey sjálvandi ikki hava verið før fyri at gera tey árini, tey høvdu skuldina hangandi yvir sær. Og so eru vit aftur í sama spori.

Tey flestu av hesum fjósum eru básafjós, sum eru sera ótíðarhóskandi og arbeiðskrevjandi, og skulu vit gera okkum vónir um at fylgja við í tíðini, so krevjast sera stórar íløgur, fyri at fáa hesi fjós at vera nýtulig í 20-30 ár afturat.

Eg meini, at tað hevði verið mikið skilabetri at gjørt sær eina saneringsleist, sum setti tað ófrávíkiliga krav, at fyri at sanera skuldina, skuldu fjósini lagt saman, so at ein tryggjaði sær, at hetta veruliga blivu nakrar eindir sum bóru seg. Eftir núverðandi ætlan verður als eingin trygd fyri, at hesi fjós ikki enda aftur í sama díki, sum tey hava hava verið í.

**Einskiljing**

Eg eri av teirri hugsan, at tann almenna jørðin í Føroyum ikki eigur at verða einskild. Mær dámar væl tann leistin, sum hagartil hevur verið nýttur viðv. festaraskifti o ø, av tí at eg meti meg og aðrar, sum ein týdningarmiklan part av tí mentunnararvi, sum vit hava fingið frá teim undanfarnu, og eg haldi, at vit hava skyldu at bera hann víðari, og ikki lata Mammon sleppa at ráða í øllum førum.

Tá tað er sagt, skal eisini sigast, at vit eiga at fáa so nógv burturúr til at lata víðari, sum gjørligt. Økja vit um virðið á garðinum, sum tað almenna eigur, so skulu vit sjálvandi eisini fáa tað økingina útgoldna frá tí almenna, tá vit gevast. Sum nú er, gera vit sjálvir íløgur í almenna ogn, uttan at vit síggja eitt einasta oyra aftur. Fótin í afturpartin, tá vit leggja frá okkum.

Mín meining er, at vit skulu eiga sethúsini sum vit búgva í, og sum vit sjálv hava goldið fyri. Hetta er ikki so í øllum førum. Seyðhús, fjós o.a, er at meta sum rakstrargøgn á garðinum, og eiga tí eftir míni hugsan, at hoyra til garðin.

Í flestu førum, er arbeiðsdagurin hjá bóndum sera langur og likamsliga krevjandi, men lønin hevur tíverri bara verið í afturgongd, tey seinnu árini. Her má polittiski myndugleikin taka sær um reiggj,ásanna henda trupulleikan, og síðani gera okkurt, fyri at bøta um hesa skeivu gongd, tí vit kunnu ikki liva við, at tað bara gongur aftur á bakka hjá bóndum, tá ið tað gongur so væl í samfelagnum annars. Úrslitið av tí verður einans at, sum tíðin líður, verður ongin at hava áhuga fyri, at fáast við landbúnað longur. Og tá hava vit mist nógv.

Hvat er so at gera, fyri at steðga hesi skeivu gongd?

Jú, nógvir eru batarnir, ið gerast kunnu. Beinleiðis studningur er ein, sum eg tó ikki havi so stóra trúgv uppá letur seg gera, reint polittiskt. Ein annar møguleiki er, at avtaka meirvirðisgjaldið á øllum landbúnaðarvørum, og ikki bert á mjólkini, sum Javnaðarflokkurin ætlaði at skjóta upp. Hetta hevði hjálpt nógv um støðuna. Eisini er ein møguleiki, at lata bøndir gjalda max. 20% av inntøkuni í skatt, sum øll partafeløg gera. Hetta hevði havt við sær, at fleiri pengar høvdu verið til taks, til neyðugar íløgur á garðinum, samstundis sum meir hevði verið í bóndans part. Fiskivinnan hevur eina skipan, sum er at 15% av inntøkuni er skattafrí, sjálvt nú tá ið best stendur til og inntøkurnar eru í topp. Hetta er teimum sera væl unt, tí at hetta vísir teimum, at tað loysir seg at gera ein eyka innsats.

Hesa motivatión treingja vit so avgjørt til at fáa í landbúnaðin, á ein ella annan hátt. Trupulleikin hevur bara víst seg at vera vantandi polittiskur vilji.

Eftir uppskoti frá Vinnumálastýrinum skal Jarðarráðið avtakast, og búnaðarbanki vera í staðin, beinleiðis undir landsstýrismanninum. So er bert at vóna, at ein ikki skal hava ávísan politiskan lit, fyri at fáa fígging í framtíðini.

Annars haldi eg, at vit skuldu sett eitt loyvisráð (koncessiónsráð), til at halda skil á, at vit ikki øll fara at leggja okkum eftir somu framleiðslu, við tí úrsliti, at ongin fær nakað at bera til. Hetta hevði gjørt sítt til, at íløgurnar í framtíðini høvdu verið betri gjøgnumhugsaðar.



# Brandur sigraði





**Íslendsk bløðini skriva, at Brandur kom, sá og sigraði. Framførslan á Broadway eydnaðist sera væl, og íslendska spælistaðið vil hava Brand aftur at vitja.**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Sunnudagin hevði Brandur Enni konsert á Broadway í Reykjavík. Frammanundan vóru tekin um, at tað kundi gerast eitt spennandi tiltak sæð við føroyskum eygum. Og soleiðis gjørdist tað eisini.

Nógv fólk var og lurtaði eftir tvørámanninum, og serliga ungar gentur hildu seg fram at.

Sjálv framførslan gekk avbera væl, og hetta fekk íslendsku bløðini at rósa føroyska sangarunum við stórum orðum mánadagin. Okkurt blaðið skrivaði, at Brandur kom, sá og sigraði.

## Góð ummæli

Tað eru ikki bara íslendingar, sum eru fegnir um framførsluna. Eisini umboðsmaðurin hjá Brandi var væl nøgdur.

- Tað gekk rættiliga væl, og vit høvdu mánadagin fund við Broadway, har teir søgdu seg vilja hava Brand aftur at spæla har. So okkurt stendur eftir, sigur Steintór Rasmussen.

Samstundis sum konsertin varð hildin, kom eisini stakfløgan Still Friends út í Íslandi. Tað er er her, at Brandur syngur duett saman við íslendsku Jóhannu Guðrun.

## Síðani Danmark

Føroyska ferðalagið í Íslandi taldi sløk 20 fólk. Tónleikarar, dansarar og umboð fyri danskar fjølmiðlar vóru við, og tey strandaðu øll í Íslandi í mánadagin, tí flogfarið fleyg ikki sum ætlað. Í gjár skuldu tey koma aftur til Føroya

Næsta málið hjá Brandi er at koma meira fram í Danmark. Har verður ein stakfløga givin út í næstum, og seinni kemur eisini ein fløga út.



